# B68 smakkaði sigursráka

**Toftamenn komu á odda beinanvegin, og so var lítil ivi um, at øll stigini fóru at vera á Svangaskarði, sjálvt um sandoyingar avgjørt ikki pakkaðu seg saman**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

*Súni Fríði Johansen tykist nú aftur hava funnið stevið. Sunnudagin skeyt hann tvey mál móti sandoyingum*

Ivaleyst høvdu sandoyingar, tá teir komu til Toftir, einki ímóti, at teir skuldu fara avstað aftur við javnleiki. Men tað kom næstan ongantíð upp á tal at spæla verjukent og dyrgja eftir javnleikinum.

B68 legði fyri sum eitt ódnarveður. Jóannes Jakobsen vildi hava teir at spæla skjótt og ágangandi, og tað var týðuligt, at ætlanin var, at spælið skuldi togast í borðini. Arnold Joensen lá uttarlaga í høgru, og Øssur Hansen lá heilt úti í vinstru. Tað var landsliðsmaðurin, sum setti hol á, tá bara tríggir minuttir vóru farnir. Hann slepti persónliga mótstøðumannin av sær, drúg tvørturum og sendi flatt í handara síðunetið.

B71 málverjin Allin Simonsen bjargaði fleiri ferðir fyrstu løtuna, og bæði stólpi og tvørtræ hjálptu til. B71 málverjin royndist væl, men tað skerst ikki burtur, at tað var ein smeitur hjá sandoyingum, at Valdemar Nowisci ikki var við. Hann gjørdist sjúkur leygardagin, og tí skil var hann ikki tann eyka megin, sum við styrkini í luftini og skjótleikanum á strikuni kundi hildið tætt hjá gestunum.

### Óstøðugt

Toftaspruttið linkaði, tá fyrra umfarið var hálvrunnið, ferðin dalaði, og so kom B71 meiri við. Julian Floresco, sum fyrri fyrstu ferð í ár fekk møguleikan frá fyrsta bríksli í landskappingini, og Eli Hentze megnaðu í løtum at stýra eitt tvey samanspæli. Og Kári Nielsen, sum eftir drúgvan skaðasteðg var við fyri fyrstu ferð í ár, var hegnigur í álopinum.

Tað setti ein rættuligan hvøkk í, tá sandoyingar javnaðu. Julian Floresco sendi úr vinstru frísprark tvørtur um, og úr tólv metra fjarstøðu og eitt sindur til høgru stútaði miðverjin Bjørn Thorsteinsson høgt upp. Bólturin dalaði niður, og eingin vandi tóktist vera, tá B68 málverjin loftaði, men ólukkutíð fyri heimaliðið, so datt málverjin afturav og misti bóltin í málið.

Málið hevði við sær, at B71 blomstraði eina løtu, og teir tilspældu sær fleiri hornaspørk. Men fram ímóti steðginum fekk heimaliðið valdið aftur. Lítla løtu undan steðginum komu teir framum aftur. B71 dølladi í verjuspælinum, tá B68 tvær ferðir upp í slag fekk loyvi at taka stutt horna í vinstru, og seinnu ferðina stýrdi Súni Fríði Johannesen við handara stólpan innlegginum frá Øssuri Hansen inn við stólpanum.

Í 2. hálvleiki legði B68 ágrýtið fyri. Ungi miðvallarin, Jann Ingi Petersen, heilfluktaði úr átjan metrum á tvørtræið, og Mortan Hansen stútaði úr stuttari fjarstøðu niður í og upp úm.

Súni Fríði Johannesen, sum í fjør gjørdi hattrikk á Svangaskarði ímóti B71, gjørdist hesa ferð tvey mála skjútti, tá hann var fyrstur á, eftir at fínt uppspæl frá Øssuri Hansen endaði við fløtum innleggi frá Arnoldi Joensen úr høgru. Mortan Hansen sendi í samankomingina, og miðframherjin var fyrstur á returinum.

Sum 2. hálvleikur leið gjørdist spælið alt minni skipað. B71 setti spenning í aftur, tá teir minkaðu um munin til 3–2. Magnus Poulsen hálvbjargaði frísparksroynd frá Juliani Floresco, og Kári Nielsen var fyrstur á returbóltinum.

At tað bara var eitt mál á muni hevði við sær, at nervin alla tíðina var til staðar. Men B71 fekk eini burturúr. Í síðstu løtu stútaði Fróði Benjaminsen, sum avgjørt var ímillum teir fræagaru á vøllinum, við nærra stólpan innlegg frá Øssuri Hansen dygst inn við stólpanum, og harvið hevði B68 vunnið fyrsta sigurin í hesum árinum.

**B68-B71 4-2 (2-1)**
1-0: Øssur Hansen 3
1-1: Magnus Poulsen (sjálvmál) 32
2-1: Súni Fríði Johannesen 44
3-1: Súni Fríði Johannesen 56
3-2: Kári Nielsen 75
4-2: Fróði Benjaminsen 90

**Dómari:** Suni Johansen

**B68:** Magnus Poulsen – Marlon Jorge, Jan C. Dam, Hans Fróði Hansen, Jákup Eli Olsen – Arnold Joensen, Jann Ingi Petersen, Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen – Mortan Hansen, Súni Fríði Johannesen

B71: Allin Simonsen – Bjørn Thorsteinsson, Bernhard Petersen, Jógvan Jón Petersen – Svenning W. Hansen, Eli Hentze, Julian Floresco, Jón Brekku, Hans Jørgen Djurhuus – Høgni Hansen, Kári Nielsen

NSÍ-Sumba 2-1 (0-1)

# Sumba tveitti stigini burtur

**Eftir at hava haft tamarhald á fyrrapartin av dystinum, mistu sumbingar alt á gólvið í seinna**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tá tað í fjør gjørdist greitt, at sumbingar noyddust tungu leiðina í aðru deild, mundu mong rokna við, at hetta var tað seinasta, sum vit sóu til Sumba í fremstu røð.

Fólkagrundarlagið er tunt í syðsta partinum av landinum, men hóast hendan tunga veruleika, so var tó líkt til, at sumbingar høvdu ætlanir um at vinna seg upp aftur. Jugoslavisku leikararnir vórðu verandi í felagnum, og tá flestu hini álitini á liðnum samstundis vórðu eftir, sá framtíðin kanska ikki heilt so døpur út kortini.

### Áttu hálvleikin

Eftir eina trilvandi byrjan, sum millum annað hevur borið tvey tap á heimavølli, var tað tí við ætlanum um trý stig, at Sumba fór til Runavíkar leygardagin.

Fyrstu løtuna sá eisini út til, at hetta skuldi fara at hepnast hjá sumbingum. Teir vóru omaná í flestum lutum, og tað eydnaðist teimum eisini at leggja seg á odda. Málið kom, tá Jan Poulsen úr høgru sendi eina langa aflevering tvørtur um vøllin, har Baja gjørdist púra leysur, soleiðis at hann kundi senda bóltin í netið.

### NSÍ tók yvir

Eftir trý væl eydnað korter, roknaðu sumbingar tí helst við, at sigurin var í pottinum, men hetta roknaðu tey so ikki við NSÍ. Runavíkingar settu seg nú fullkomuliga á miðvøllin, har sumbingarnar eisini høvdu gjørt onkrar rokeringar, og úrslitið av yvirvágni hjá heimaliðnum lág heldur ikki eftir.

Fyrst var tað Bergur Djurhuus, sum var hægstur eftir frísparksinnlegg, so hann kundi stúta í kassan, og lítla løtu seinni varð Fróði Jóanesarson leiktur púra leysur, soleiðis at hann einsamallur við málverjanum kundi økja.

Seinastu løtuna royndu sumbingar at trýsta, men rættiliga vandamikið gjørdist tó ikki. Heimaliðið var tó sera vandamikið í mótálopum, og tað hevði einki forgjørt verið í, um teir øktu um leiðsluna, men tað nærmasta teir komu, var eitt skot frá Fróða Jóanesarson, sum small í tvørtræið og niður á málinjuna.

Við sigrinum togaði NSÍ seg heilt upp móti oddaliðunum, meðan sumbingar enn ikki hava sannført um, at teir í ár skulu gera seg galdandi í oddinum. Ivaleyst kom tað tó væl við, at flestu liðini í oddinum mistu stig, soleiðis at frá framhaldandi hava møguleika at blanda seg uppí.

**NSÍ-Sumba 2-1 (0-1):**
0-1: Nebojsa Velkovic
1-1: Bergur Djurhuus
2-1: Fróði Jóanesarson



# Søguligur sigur til Sundalagið

**Fyri fyrstu ferð nakrantíð eydnaðist tað EB/Streymi at fáa stig á útivølli í bestu deildini**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Eftir sigurin á útivølli ímóti B71 duttu vágamenn ordu-liga niður á jørðina, eftir at teir í eina stóra viku hava flogið høgt.

Tað verður roknað við, at EB/Streymur og FS Vágar fara at teljast ímillum mest uppløgdu evini til niðurflyting, og tí var heimatapið hjá FSV ímóti EB/Streymi serliga meint.

Sigurin kendist serliga søtur hjá EB/Streymi, tí hetta var fyrsta ferðin nakrantíð, at teir fingu stig burtur úr einum landskappingardysti á útivølli í bestu deildini. Tá teir fyri sjey árum síðani vóru í 1. deild, vunnu teir tvær ferðir og spældu tríggjar ferðir javnt. Tað gekk alt fyri seg á heimavølli, meðan allir níggju útidystirnir vórðu taptir.

Fyri sjey árum síðani var Bergur Magnussen, sum nú hevur ábyrgdina av EB/Streymi, spælari, men hann var ikki so ofta við, tí hann var ofta plágaður av skaðum. Umframt hann er tað bara ein spælari hjá EB/Streymi, sum var við í 1994, og sum var við í Miðvági sunnudagin. Tað er Knút Vesturtún. Hann hevur fyrr í ár verið verjukendur sentralur miðvallari. Hesa ferð var hann fluttur meiri út í vinstru síðu. Plássið í miðjuni røkti nýggi maðurin hjá teimum í Sundalagnum, Andrzej Pacek, sum í fjør og í fyrraárið spældi við KÍ, og sum í ár ikki hevur megnað at spæla seg til pláss í besta hópinum hjá B36.

Pacek kann í hvussu so er erpa sær av, at hann hevur bara vunnið, tá hann hevur umboðað EB/Streymi:

– Eg eri stak væl nøgdur við mínar spælarar. Serliga í 1. hálvleiki vóru teir grammir, og tað var týðuligt, at Pacek er ein góður styrkur at hava fingið hjá okkum. Hann var íðin og nærlagdur, og avrikið hjá honum minti ikki sørt um tey, sum hann plagdi at vísa tað fyrra árið, tá hann var í Klaksvík, heldur Bergur Magnussen, venjari hjá EB/Streymi.

Bergur er vísur í, at sigurin í Vágum hevur stóran týdning á fleiri økjum:

– Umframt kærkomnu stigini, sum sigurin ber við sær, so hevur tað eisini stóran týdning fyri sjálvsálitið hjá spælarunum, at teir vita, at tað ber til at vinna, og tað verður eisini hugaligari hjá okkum, nú tað hevur eydnast at vinna á útivølli, heldur venjarin.

### Eyðsýndur munur í fyrra umfarinum

EB/Streymur var frammanfyri 2–0, tá tað var hálvleikt. Í seinna umfarinum eydnaðist tað FS Vágum at minka um munin, og í eina løtu birti veruleikin, at munurin bara var eitt mál, vónina hjá vágamonnum, at tað skuldi eydnast at fáa stig, og teir royndu at leggja trýst á gestirnar. At teir styrktu um álopspartin og so at siga ikki spældu við garderingum í verjuni hevði málmøguleikar við sær í báðum endum, og tað var bara gestandi liðið, sum fekk mál.

Eitt gott korter var farið, tá EB/Streymur fekk hol á. Jón Sigurd Gleðisheygg varð feldur í brotsteiginum, og Sorin Anghel, sum aftur hesa ferð taldist ímillum teir mest eyðsýndu hjá EB/Streymi umsetti úr ellivu metrum.

Løtu seinni vóru teir báðir omanfyri nevndu aftur upp á spæl. Hesa ferð var tað Sorin Anghel, sum legði innfyri úr vinstru, og Jón Sigurd Gleðisheygg stútaði í málið.

Tá FS Vágar í 2. hálvleiki minkaði um munin, var tað fyri ein stóran part orsaka av einsamøllum avriki frá Birgiri Joensen, sum sneiddi fleiri av sær, áðrenn hann var komin í góða skotstøðu og sendi framvið Gunnari á Steig.

Sorin Anghel átti 3–1 málið, sum staðfesti EB/Streyma sigurin. Hann varð spældur leysur á miðjuni og fekk møguleika at draga fittan tein, áðrenn hann sendi framvið málverjanum og harvið staðfesti søguliga sigurin hjá EB/Streymi.

**FS Vágar-EB/Streymur 1-3 (0-2)**



*Sorin Anghel var høvuðsmaður aftan fyri fyrsta útisigurin hjá EB/Streymi í 1. deild*

0-1: Sorin Anghel (br.) 16
0-2: Jón Sigurð Gleðisheygg 23
1-2: Birgir Joensen 67
1-3: Sorin Anghel 78

Dómari:
FS Vágar: Arturas Ramoska – Tróndur Ravnsfjall, Ruslan Screlea, Vladlen Osipov, Pól Kjartan Thomsen – Tór–Ingar Akselsen, Hannus Olsen, Birgir Joensen, Sonni Johansen – Kim Poulsen, Magnus Simonsen
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Alfred Jacobsen, Ólavur Poulsen, Christian Carlsson – Halldórur Joensen, Jákup Martin Joensen, Andrzej Pacek, Knút Vesturtún, Eyðfinn Joensen – Jón Sigurd Gleðisheygg, Sorin Anghel